tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Óneyðug framferð

Oddagrein

At fara eftir manninum heldur enn bóltinum er mangan nýtt, tá argumentatiónin ikki strekkir til. Hesum hava landstýrismaðurin í Fiskivinnumálum og ávísir reiðarar gjørt seg sekar í.

Uppskotið frá Búskaparráðnum er óvanligt, men einki eigur at vera tagt burtur. Tað er gott at hava eitt kjak um evnið, so øll sjónarmið koma fram í ljós. Føroyingar hava fleiri ár at kjakast í, tí uppskotið kann ikki koma í gildi fyrr enn í 2004. Tað er í lagi, at menn eru ósamdir, men at viðgera familju og annað hjá uppskotstillarum er heilt burturvið og sigur ikki so lítið um muruna í teimum, ið gera slíkt.

Dagblaðið helt, at Búskaparráðið átti at verið avtikið. Nú er tað soleiðis, at um eitt ráð skuldi verið avtikið, hvørja ferð tað ikki var samt við Fólkaflokkin, so vóru ikki nógv ráð eftir í hesum landi, og demokratiið hevði verið í ússaligum standi. Sama blað sigur, hóast tað er staðfest í lógini um vinnuligan fiskiskap, at fiskurin ikki er ogn føroya fólks — so fáa vit í hvussu so er staðfest, hvat Fólkaflokkurin meinar um tað.

At reaktiónirnar frá Fólkaflokkinum og reiðarum eru so sterkar er kanska tekin um, at hettar uppskot hóast alt ikki er so heilt burturvið. Tey skip, ið hava verið handlað í seinastini við fiskiloyvum, hava verið handlaði til ein yvirprís, tí tey hava fiskiloyvi. Við øðrum orðum gjalda reiðarir longu fyri fiskiloyvi. Spurningurin er bara til hvønn, og hvat hevur viðkomandi latið fyri somu loyvi. Tað er undir øllum umstøðum helit burturvið, at menn fáa fiskiloyvi fyri einki frá landinum og síðani stutta tíð aftaná selja tey fyri millióna-upphæddir.

Tað kann sjálvsagt verða eitt sindur hugstoytt fyri summi, um ein fiskidagamarknaður verður settur á stovn. Vandin kann vera ov fáar hendur á døgunum, men spurningurin er, um ein umsetilig skipan kann vera øðrvísi. Skalt tú hava loyvi at selja landsins ogn, so mást tú vælsaktans keypa hana fyrst. Kanska kundi ein slík skipan gjørt, at vit fingu - gaman í færri - men betri konsoliderað reiðarí. Kanska vildu somu reiðarí fingið ein breiðari eigaraskara, tí krøv til partapening kunnu gerast størri. Spurningar eru nógvir. Til dømis kundi ein spurt, um flakavirkir kundu keypt kvotur, um keyparar skulu forhondsgóðkennast av myndugleikunum o.s.fr.

Tað hevur verið nevnt, at ein slík skipan er í samsvar við Caragata álitið. Líkt er til, at Fólkaflokkurin bert tekur undir við Caragata álitinum, tá tað kemur til skatt og almennan sektor. Tá tað kemur til, at sokallaðir vinnulívsmenn skulu út undan veingjunum hjá landskassanum og gerast rættir vinnulívsmenn uttan frammihjárætt, so stendur sum altíð á gomlum nøglum. Vit hava á hesum stað ikki verið so ovurfegin um Caragata álitið, og eru tað framvegis ikki, men tað tykist at vera løgið, at ávísir partar av tí, ið Caragata leggur upp til, als ikki kann diskuterast, meðan annað verður gjarað út um hvørja geil av Fólkaflokkinum.

Núverandi samgonga hevur sjálv tvíhildið um umsetiligheit í fiskivinnuni, og spurningurin er, um uppskotið frá Búskaparráðnum ikki er ein sjálvfylgja av hesum politikki. Ber tað til at hava eina eitt sindur umsetiliga skipan? Tað skal í hvussu so er vera okkara vón, at uppskotið frá Búskaparráðnum fær ta sømuliga viðgerð, sum eitthvørt fakligt uppskot hevur uppiborið.

Sosialurin

Trúnaðarstemplið skal verja viðgerðina

Landsstýrið heldur uppritið til samráðingarnar við donsku stjórnina loyniligt fyri at fáa best møguliga viðger í uttanlandsnevndini

JOHN JOHANNESSEN

– Uttanlandsnevndin skal hava frið at viðgera uppritið. Landsstýrið hevur stemplað tað í trúnaði fyri at verja viðgerina, og tí er tað óheppi, at partar av innihaldinum í uppritinum er vorðið alment gjørnum fjølmiðlarnar.

Hetta er svarið frá Høgna Hoydal, eftir, at tað er vorðið greitt, at nógv umtalaða uppritið til samráðingarnar við donsku stórnina ikki verður almannakunngjørt, eins og væntað.

Løgmaður í tvístøðu

Annfinn Kalsberg, løgmaður, heldur einki vera í vegin fyri at almannakunngera uppritið. Men orsøkin til, at hann hevur tikið støðu til ikki at almannakunngera tað er, at hetta setir hann í eina tvístøðu.

– Tað er púra rætt, at landsstýrið í sínum útmeldingum hevur lagt stóran dent á, at tað metir opinleika at vera ógvuliga tíðandi í hesum máli. Tað er eisini rætt, at ein ávísur vandi er fyri illgitingum og skeivum upplýsingum, um uppritið ikki verður almannakunngjørt fyri Føroya fólki. Men hinvegin eru aðrir vansar, um uppritið verður almannakunngjørt.

Løgmaður vísir á, at verður uppritið almannakunngjørt, má alt samskifti millum landsstýrið og uttanlandsnevndina eisini almannakunngerast, og tá verða upplýsingar, ið kunnu skaða samráðingarstøðuna eisini almannakunngjørdir.

Landsstýrið var týsdagin á fundi við uttanlandsnevndina, og tá merkti landsstýrið sambært Høgna Hoydal á uttanlandsnevndini, at hon helst ikki vildi hava uppritið almannakunngjørt, tí hon sá vanda fyri, at hetta fór at ávirka viðgerðina í sjálvari nevndini.

Danir møguliga kunnaðir áðrenn føroyingar

Millum 13. og 24. mars fer løgmaður á fund við danska forsætisráðharran. Tá fær Poul Nyrup Rasmussen eitt uppskot til nýggjan sáttmála, ið er grundaður á uppritið, ið er latið uttanlandsnevndini. Sostætt verður danska stjórnin kunnað um innihaldið í uppritinum og meira afturat á hesum fundi. Men kortini er ikki vist, at Føroya fólk verður kunnað áðrenn hetta.

Í hesum sambandi sigur løgmaður seg aftur vera í einari tvístøðu.

– Tað er púra rætt, at tað kann kennast løgi, at Føroya fólk ikki verður kunnað áðrenn hol verður sett á samráðingarnar, men eg tori rætt og slætt ikki at lova, at fólkið verður kunnað, tíverri.

Evstamarkið kroystir ikki nevndina

At løgmaður hevur biðið Nyrup um fund einaferð millum 13. og 24. mars gevur uttanlandsnevndini at evstamark til at vera liðug at viðgera uppritið. Men løgmaður sigur, at henda ikki verður almannakunngjørt.

– Vit mugu nú leggja allar kreftir í at gera málið so greitt, sum gjørligt fyri Føroya fólki, uttan at bróta trúnaðarskyldu okkara. Uppgáva okkara at greiða træðirnir verður nú enn størri.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann ikki kennir seg væl við, at hann, sum limur í uttanlandsnevndini, skal taka avgerir fyri lagnuna hjá Føroya fólki, ið hava fingið bind fyri eyguni í hesum máli. Samstundis sigur hann seg ikki skilja, at málið yvirhøvur verður hildið loyniligt, tí tað kann ikki gera nakran skaða, um tað kemur út til fólkið, ið hevur rætt til at verða kunnað um tað.

– Í veruleikanum heldur landsstýrið føroyingar fyri gjøldur, tá tað samstundis sum tað ikki vil almannakunngera uppritið fyri føroyingum hevur meldað út, at danir fáa upprtið og eitt uppskot til samráðingar í freist er gjørd í fullum samráð við nevndina, ið ongan trupulleika sær í, at hon skal vera liðug við viðgerina til hesa tíð.

– Vit hava eisini boðað Nyrup frá, at uttanlandsnevndin skal vera liðug áðrenn vit fara í gongd við samráðingarnar, sigur løgmaður.

Anfinn Kalsberg sigur orsøkina til, at hann nú hevur biðið Poul Nyrup Rasmussen um fund vera, at danska stjórnin hevur stramman álmannakka, og skal hon, eins og føroyingar hava tíð til at fyrireika seg, áðrenn hol verður sett á endaligu samráðingarnar.

Annfinn Kallsberg, løgmaður

Viðmerkingar:

Búskaparráðið og fiskivinnan enn einaferð

Vit hava einki ímóti, at ein opin fiskidagamarknaður verður settur á stovn. Men tað sum

Búskaparráðið skjýtur upp, er at okkara núverandi fiskiloyvir skulu inndragast og øll okkara høvuðsvinna skal síðani bjóðast út á auktión fyri eitt styttri tíðarskeið í senn.

Avleiðingarnar av hesum verða ræðuligar, tí ongin kann hava skip og útróðrarbátar undir so ótryggum viðurskiftum.

Alt er í prinsippinum ogn Føroya fólks. Men fyri at fáa ogn Føroya fólks til samfelagsskapt virði, er neyðugt, at fólk leggja rygg til og fara inn við váðafúsum kapitali. Úrslitið av hesum er m.a. fyri fiskiflotan, at vit løgdu uml. 100.000 tons uppá land til føroysku flakavirkini í fjør. Hetta skapti so aftur virðir, arbeiðspláss, skattainntøkur o. s. fr. Óneyðugt er at greiða frá, hvønn týdning hetta hevur fyri samfelagið.

Politikarar eru valdir til at umsita ogn Føroya fólks. Men Búskaparráðið fer so langt út um alt mark, at teir skjóta upp, at hesin fiskidagamarknaður skal vera einaráðandi t.v.s. uttanfyri (les omanfyri) okkara demokratiskt valda løgting.

Uppskot Búskaparráðsins hóttir ikki bara við at taka fótin undan føroysku fiskivinnuni og øllum teimum, ið av henni liva ? uppskotið er í veruleikanum ein hóttan ímóti sjálvum demokratinum. Og hetta er bert byrjanin. Tað næsta verður restin av fiskiflotanum, bóndagarðar, alibrúk o.s.fr.

Hesir maktsjúku menn hava eina ætlan um at fáa tað totala valdið á fiskiflotanum — jú, víst er her vandi á ferð.

Bjarti Mohr

Viðmerking til Kára Johannesen

Eg gjørdist bilsin og ikki sørt ørkymlaður, tá eg í grein í týsdagsblaðnum las nakrar hugleiðingar, sum Kári Johannesen, stjóri í einum av teimum stóru vinnulívsfyritøkunum í Føroyum, hevði havt á fundi fyri politikarum í Eysturoynni um m. a. skúlagongd hjá handverkslærlingum.

Um eg skal gera stutta niðurstøðu av greinini, kann hon eftir míni fatan sigast nakað soleiðis.:

Innlæringin hjá handverkslærlingum er umvent propertional við skúlatíðina.

T. v. s. um lærlingar gingu helvtina minni tíð í skúla, vóru teir dupult so dugnaligir. harafturat hevði tað føroyska samfelagið spart eina munandi upphædd, og høvdu øll tá vunnið — møguliga eisini lærlingarnir???

Um Kári Johannesen metir, at Tekniski Skúlin gevur eina ov vánaliga undirvísing, er skylda hansara at gera vart við hesi viðurskiftini. Hetta má tó verða til rætta viðkomandi, sum í hesum førinum er skúlastjórin — og ikki politikarar í Eysturoynni.



Um tað hinvegin er longdin av skúlagongdini og innihaldið í útbúgvingini, er tað heldur ikki politikararnir úr Eysturoynni, sum hava ábyrgd ella møguleika fyri at broyta hesi viðurskiftini. Í hesum førinum er tað Kári Johannesen, (gjøgnum yrkisnevndirnar) sum skal taka avgerð um hetta. (yrkisnevndirnar eru 100% umboðaðar av vinnuni)

Yrkisnevndirnar boða síðani skúlunum frá, hvørjar kunngerðir eru galdandi, og skal Tekniski Skúlin út frá hesum geva ta áløgdu frálæruna.

Egon Øregaard, skúlastjóri á Tekniska Skúlanum í Tórshavn

Føroyingar fingið bind fyri eyguni

Formaður Javnaðarflokisns, Jóannes Eidesgaard, skilir ikki, at landsstýrið vil halda framtíð Føroya loyniliga fyri Føroya fólki við ikki at almannakunngera uppritið til ríkisrættarligu samráðingarnar

JOHN JOHANNESSEN

– Málið um ríkisrættarligu støðu okkara verður handfarið eins og talan var um krígsførslu. Ált málið verður hildið loyniligt fyri fólkinum meðan herovastarnir leggja ætlanirnar.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins og uttanlandsnevndarlimur, sigur sig ikki skilja handfaring landsstýrissins av fullveldismálinum. Hann vísir á, at bæði Høgni Hoydal og Annfinn Kalsberg, løgmaður, ferð eftir ferð hava tosað um týdningin av at vera opin fyri Føroya fólki í júst hesum máli. Men eftir hansara tykki fremur landsstýrið júst tað øvugta, tá tað ikki vil almannakunngera nógv umtalaða uppritið, sum í løtuni verður viðgjørt í uttanlandsnevndini.

Stór avbjóðing

Formaður Javnaðarfloksins ásannar, at málið nú er vorðið ein enn størri avbjóðing fyri andstøðuna, tá upprtið ikki verður almannakunngjørt.

– Vit mugu nú leggja allar kreftir í at gera málið so greitt, sum gjørligt fyri Føroya fólki, uttan at bróta trúnaðarskyldu okkara. Uppgáva okkara at greiða træðirnir verður nú enn størri.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann ikki kennir seg væl við, at hann, sum limur í uttanlandsnevndini, skal taka avgerir fyri lagnuna hjá Føroya fólki, ið hava fingið bind fyri eyguni í hesum máli. Samstundis sigur hann seg ikki skilja, at málið yvirhøvur verður hildið loyniligt, tí tað kann ikki gera nakran skaða, um tað kemur út til fólkið, ið hevur rætt til at verða kunnað um tað.

– Í veruleikanum heldur landsstýrið føroyingar fyri gjøldur, tá tað samstundis sum tað ikki vil almannakunngera uppritið fyri føroyingum hevur meldað út, at danir fáa upprtið og eitt uppskot til samráðingar í mars.

Uttanlandsnevndin knívin á barkan

Síðani Hvítabók varð almannakunngjørd hevur landsstýrið lagt stóran dent á, at uttanlandsnevdin skuldi fáa alla ta tíð, henni tørvaði, til at viðgera uppritið til samráðingarnar, tá tað einaferð var klárt.

Men týsdagin varð almannakunngjørt, at løgmaður hevur sent danska forsætisráðharranum bræv við áheitan um, at skipa fyri fundi um ríkisrættarligu støðuna antin í Danmark ella í Føroyum í tíðarskeiðinum millum 13. og og 24. mars.

Á fundinum við Poul Nyrup Rasmussen ætlar Annfinn Kalsberg sær at leggja fram eitt uppskot til nýggjan sáttmála millum londini bæði somuleiðis, sum hann fer at leggja fyri danska forsætisráðharran eitt uppskot um tíðarætlan og mannagongdir í sambandi við samráðingarnar millum londini bæði.

Hetta merkir, at uttanlandsnevndin skal vera liðug við viðgerina av samráðingarupplegginum innan 13. mars. Uttanlandsnevndin hevur sostætt fingið eitt evstamark, hóast útmeldingina frá landsstýrinum um, at uttanlandsnevndin skulu fáa alla ta tíð, henni nýttist, til at viðgera málið.

Hesa viðferð av uttanlandsnevndini heldur Jóannes Eidesgaard vera alt annað enn nøktandi. Hann sigur, at hetta saman við útmeldingunum um opinleika hevur styrkt hann í vissuni um, at løgmaður sum oftast handlar beint øvugt av tí, hann alment ger greitt.

Men hóast ónøgdina við handfaringina av málinum og hóast ónøgdina við, at uttanlandsnevndin nú hevur fingið eina tíðarfreist, ger Jóannes Eidesgaard greitt, at Javnaðarflokkurin ætlar sær at viðgera málið í álvara. Tó sigur hann tað vera óvuliga ivasamt, um landsstýrið fer at samráðast við donsku stjórnina við stuðuli frá Javnaðarflokkinum.

– Eg ivist ikki í, at uttanlandsnevndin klárar at halda tíðarfreistina. Meirilutin fer helst at nikka játtandi til alt, sum stendur í uppritinum, og sostætt verður viðgerin løtt. Men Javnaðarflokkurin fer at viðgera málið í álvara, sigur Jóannes Eidesgaard.

(Les eisini viðmerking løgmans og varaløgmans á síðu 2)

Jóannes Eidesgaard harmast um gongdina í uttanlandsnevndini

Skúladepil við Marknagilsvegin í Havn

Í heyst útskrivaði Undirvísingar- og Mentamálastýrið eina almenna hugskotskapping um skúladepil við Marknagilsvegin. Ætlanin er, at skúladepilin skal vera felags karmur um teir tríggjar miðnámsskúlarnar: Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Tekniska Skúlan í Tórshavn og Føroya Handilsskúla í Tórshavn.

Freistin fyri at lata inn uppskot var úti 1. februar, og er dómsnevndin nú farin til verka.

Inn eru komin átta uppskot, sum nú verða viðgjørd av dómsnevndini og ráðgevarum hennara.

Í dómsnevndini sita:
Signar á Brúnni, landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, formaður
Leivur Hansen, býráðsformaður í Tórshavn
Egon Øregaard, skúlastjóri á Tekniska Skúla í Tórshavn
Ragnar Magnussen, skúlastjóri á Føroya Handilsskúla í Tórshavn
Hendrik Dahl, vararektari á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði
Reiulf Ramstad, arkitektur úr Noregi
Gunnleyg Durhuus, arkitektur

Ráðgevarar eru:
Rúna Hilduberg, deildarstjóri í undirvísingar- og mentamálastýrinum
Gloria Kalsø, handilsskúlalærari
Jens Frederiksen, studentaskúlalærari
Eirikur Suni Danielsen, lærari á Tekniska Skúla

Skrivari hjá dómsnevndini er:
Tórálvur Weihe, arkitektur

Dómsnevndin væntar at vera liðug við arbeiði sítt hesa vikuna, og verður úrslitið síðani almannakunngjørt.

Starvsfólk til Føroya Tele

Tænastumenning

Starvsfólk til tænastumenning innan kjarnuvinnu

Fjarskiftismarknaðurin í Føroyum mennist, og Føroya Tele hevur víst áræði og liggur á odda í hesi menningini. Uppgávan hjá Marknaðardeildini er at menna grundtænasturnar. Alla tíðina leggjast nýggjar áhugaverdar tænastur afturat innan øll virkisøki. Árið 2000 verður ikki minni annarleiðis enn árini undan, og til at menna nýggju tænasturnar tørvar okkum eitt nýtt starvsfólk, sum megnar at liva upp til framtíðar kunningarsamfelagið.

Starvsøkið er kjarnuøkið hjá Føroya Tele, sum umfatar vanliga fastnet telefoni, ISDN, fartelefonskipanirnar, boðtænastuna og eyka tænastur. Í framtíðini koma nógvar nýggjar tænastur, og størri ferð verður á nógvum av verandi tænastum.

Uppgávurnar hjá nýggja starvsfólkinum eru m.a. at:

- læra tænasturnar at kenna
- gera framskrivingar og málsetningar fyri framtíðar sølu
- gera upplegg til, hvussu tænastan skal setast saman
- gera mannagongdir, vegleiðingar og treytir
- kunna innanhýsis
- vera stuðul hjá teimum, ið hava samskifti við viðskiftafólkini
- fylgja søluni upp
- áhaldandi leita eftir møguleikum fyri at menna tænasturnar

Hetta eru spennandi uppgávur hjá tí rætta starvsfólkinum. Arbeiðið er sjálvstøðugt, hóast í tøttum samstarvi við nógv onnur á Føroya Tele. Vit hava hugsað okkum, at rætta starvsfólkið t.d.:

- hevur hóskandi marknaðarútbúgving
- hevur royndir innan sølu, marknaðarføring ella tænastumenning
- dugir væl at skriva føroyskt
- hevur skil og hegni til tøl
- dugir at finna kreativar loysnir
- dugir at arbeiða sjávstøðugt og saman við øðrum
- dugir væl at seta seg inn í nýggja tøkni og læra frá sær

Heldur tú, at tú kanst hjálpa Føroya Tele við hesum, ert tú vælkomin at søkja, eisini sjálvt um orsøkin er ein onnur enn tær omanfyri nevndu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvsbyrjan er skjótast gjørligt. Starvsstaðurin er sum grundstøði Tórshavn, men møguleiki er fyri, at starvsfólk kunnu starvast aðrastaðni. Meira fæst at vita frá Poul Henrik Poulsen ella Jónhild Rasmussen á tlf. 303030.

Umsóknir skulu vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mikudagin 16. februar 2000 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 27
FO 110 Tórshavn

FØROYATELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá PIF Teleforvnerið - Reg. no. 2697

SANDUR . TEL 355 355